Upprit

til løgtingsformannin í sambandi við lm. nr. 61/2020

Uppskot er komið frá tingmonnum um at víkja frá tíðarfreistunum millum 2. og 3. viðgerð í hesum løgtingsmáli.

Tá uppskotið, sum varð lagt fram 30. november, var til eftirkanningar í Løgtingsumsitingini, varð spurningurin um gildiskomu umrøddur. Sambært uppskotinum skal hetta koma í gildi dagin eftir, at tað er kunngjørt; tvs. at einki er, sum bendi á, at hetta var eitt skunduppskot frá byrjan. Um so var, at tað var neyðugt, at uppskotið skuldi samtykkjast endaliga í ár, átti tað at verið lagt fram við 17 undirskriftum, tí at hetta kom aftaná framløgufreistina í § 54 í Tingskipanini. Í eftirkanning okkara varð 26. november víst á hetta mótvegis Fíggjarmálaráðnum, men landsstýrismaðurin valdi ikki at heinta 17 undirskriftir til hetta málið, eins og gjørt bleiv til fleiri onnur mál, sum vórðu løgd fram um sama mundið.

Tí kann tað tykjast løgið, at tingið nú aftaná, at málið er lagt fram á vanligan hátt, skal atkvøða um at víkja frá tíðarfreistum fyri at seta uppskotið í gildi í ár.

Sambært § 85 í Tingskipanini kann tingið *í sera átrokandi førum* gera av at víkja frá reglunum í Tingskipanini. Umsitingin loyvir sær at ivast í, um hendan treyt er lokin í hesum føri.

Á Løgtingi, 15. desember 2020

Johnhard Klettheyggj
Stjóri